# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# Vil hava greið boð frá suðuroyingum

**Jacob Vestergaard vil hava greið boð frá bý- og bygdaráðunum í Suðuroy, men enn bíðar hann eftir Tvøroyrar Býráði**

VAKSTRARAVTALA FYRI SUÐUROY

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*- Tað ber ikki til at fara víðari við málinum, fyrrenn vit fáa staðfest, at allar kommunurnar í Suðuroy standa saman um ætlanina. Og tað hava vit ikki fingið váttað enn, tí allar kommunurnar hava ikki svarað, sigur Jacob Vestergaard*

- Tað fyrsta, vit mugu hava fulla greiði á, er um suðuroyingar standa saman. Men tað hava vit enn ikki fingið staðfest, tí Tvøroyrar Býráð hevur framvegis ikki svarað.

Tað eru nú tvey ár síðani, at hugskotið varð fostrað um at gera eina vakstraravtalu fyri Suðuroynna fyri at venda negativu gongdini við minkandi fólkatali.

Men hóast so long tíð er gingin, er kanska ógreiðari enn nakrantíð, um nakað fer at spyrjast burturúr.

Tey allarflestu er samd um, at Suðuroy hevur stórar, bygnaðarligar trupulleikar at dragast við. Tað eru alt ov fá størv til fólk við útbúgving og tí er neyðugt at skapa fáa nakrar vakstrarvinnur á føtur, fyri at skapa nýggj størv.

Tað vóru Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur og Magni Laksafoss, búskaparfrøðingur, ið skuldi stíla fyri arbeiðnum at gera vakstraravtaluna. Men síðani er Magni Laksafoss blivin landsstýrismaður.

Og í Sosialinum í gjár vóru teir samdir um, at nú lá bólturin hjá landsstýrismanninum í innlendismálum.

Men tað er Jacob Vestergaard ikki samdur í.

Hann sigur, at upprunaliga hevði hann ikki skilt tað soleiðis, at tað frammanundan var neyðugt at seta ein grunn á stovn við 50 milliónum í til at fíggja tey vinnuligu tiltøk, sum skuldu setast í verk eftir vakstraravtaluni.

Tí hevði skilt tað soleiðis, at forkanningin skuldi gerast og síðani skuldi støða takast til, um tilmælini skuldi setast í verk.

Tí tvíheldur hann um, at málið tók eina nýggja vend tá ið hann á einum fundi í heyst fekk hann at vita, at tað var neyðugt at hava 50 milliónir tøkar í einum grunni beinanvegin.

- Upprunaliga skuldi landið og kommunurnar í Suðuroy fíggja hvør sína helvt. Men tað mettu kommunurnar seg ikki hava ráð til og tað endaði við, at borgarstjórarnir skrivaðu eitt viljunarskriv.

Jacob Vestergaard sigur at hann skilti viljunarskrivið so, at borgarstjórarnir váttaðu, at teir vildu arbeiða víðari við málinum og nú varð leisturin tann, at landið skuldi betala 40 milliónir og kommunurnar skuldu betala 10 milliónir.

- Tað var eitt nýtt uppskot, men umsitingin í innlendismálaráðnum metir, at tað er neyðugt, at bý- og bygdaráðini frammanunan binda seg til at taka undir við ætlanini og eru sinnaðar at betala sín part av teimum 10 milliónunum.

- Eg meti ikki, at tað ber til at fara víðari við málinum, fyrrenn vit fáa vissu fyri, at allar kommunurnar í Suðuroy eru samdar um tað

Allar kommunurnar hava svarað, uttan Tvøroyri og har liggur málið í løtuni, sigur landsstýrismaðurin.

Hann sigur, at borgarstjórarnir kunnu ikki binda kommunurnar og tí er tað ein fortreyt, at bý- og bygdaráðini taka undir við ætlanini. Fyrrenn tað hendir, ber ikki til at fara víðari í viðgerðini.

- Eg havi kunnað landsstýrið um málið og havi boðað frá, at eg vendi aftur, tá ið kommunurnar hava váttað at tær taka undir við ætlanini.

- Vil største kommunan í Suðuroy ikki vera við, dugi eg ikki at síggja, at ætlanin kann setast í verk.

Hann tvíheldur um, at skal landsstýrið arbeiða víðari við málinum, krevst, at tey hava eitt ítøkiligt at viðgera. Tí leggur hann ikki málið fyri landsstýrið sum eitt ítøkiligt mál, fyrrenn allar kommunurnar hava váttað, at tær taka undir við málinum.

Hann heldur eisini at málið er broytt, tí upprunaliga lá í kortunum, at landið skuldi betala 25 milliónir, men nú er talan um 40 milliónir.

Jacob Vestergaard leggur afturat, at tá ið Løgtingið umrøddi spurningin frá Hergeir Nielsen um málið, vóru greið tekin um, at undirtøka er ikki fyri at seta pening av til endamálið, fyrrenn tað er greitt, hvat peningurin skal brúkast til.

- Tí er tað ein spurningur um vit koma víðari við ætlanini, soleiðis sum hon nú fyriliggur, leggur hann afturat.

# Órættvíst at gera Tvøroyri til syndabukk

**Borgarstjórin skilir ikki, hví Tvøroyrar býráð skal sita eftir við svartaperi**

VAKSTRARAVTALA FYRI SUÐUROY

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*- Tað var ein greið avtala, at Jacob Vestergaard skuldi leggja málið fyri landsstýrið og tí skili eg ikki, at hann nú krevur at kommunurnar skulu viðgera málið. Men er tað treytin, taka vit málið upp, sigur Kristin Michelsen*

- Tað er ikki rætt at gera Tvøroyrar Býráð til at syndabukk fyri at tað gongur so strilti at seta vakstraravtaluna fyri Suðuroy í verk.

Tað heldur Kristin Michelsen, borgarstjóri.

Hann sigur, at fundur hevur verið ímillum allar kommunurnar í Suðuroy og landsstýrismannin í innlendismálum, har borgarstjórarnir skrivaðu undir eitt viljunarskriv, har teir váttaðu at kommunurnar í Suðuroy skuldi betala tilsamans 10 milliónir í ein grunn at fíggja ætlanina.

Samstundis skuldi landið fíggja 40 milliónir.

- Tað var ein heilt greið avtala við landsstýrismannin, at hann síðani skuldi leggja málið fyri landsstýrið.

Tí skilir Kristin Michelsen ikki, hví tað nú skal vera eitt krav, at bý- og bygdaráðini skulu samtykkja málið eisini.

- Tað var ein greið avtala við Jacob Vestergaard, at hann skuldi fáa undirtøku í landsstýrinum fyri at fíggja tær 40 milliónirnar, sum tosað varð um á áðurnevnda fundi við kommunurnar.

Men nú vil Jacob Vestergaard hava, at bý- og bygdaráðini skulu gera eina formliga samtykt fyri at vátta, at tær, hvør í sínum lagi, eru sinnaðar at fíggja sín part av teimum 10 milliónunum. Hví samtykkir Tvøroyrar Býráð bara ikki málið og sendir tvær reglur norður til Landsstýrið um at málið er samtykt, so er tann snávingarsteinurin beindur av vegnum?

- Ja, kemur tað at standa á tí, taka vit tað upp í Tvøroyrar Býráð til viðgerðar. Annars er tað ov bíligt at hongja Tvøroyrar Kommunu út, tí tá ið málið varð viðgjørt á Løgtingi, vóru nógvir tingmenn úr fleiri flokkum ímóti at seta vakstraravtaluna í verk, soleiðis, sum hon er stungin út í kortið, eisini frá suðuroyartingmonnum.

Annars sigur Kristin Michelsen, at nógv ivast í, um grundarlag er longur fyri vakstraravtaluni, tí Vágs Býráð er ikki sinnað at leggja oynna saman í eina kommunu.

Jógvan Mørkøre og Magni Laksafoss hava ongantíð sett sum treyt fyri vakstraravtaluni, at kommunur skulu leggja saman?

- Nei, men tað er ein spurningur, sum býráðslimir hava reist og tí er tað ein spurningur, sum má viðgerast í hesum sambandi, sigur Kristin Michelsen.

Spurningurin um kommunusamanlegging í hesum sambandi varð reistur á seinasta býráðsfundi á Tvøroyri.

## Gongdin higartil

Tað eru nú meiri enn tvey ár síðani, at kommunurnar í Suðuroy heittu á Jógvan Mørkøre og Magna Laksafoss um at gera eina vakstraravtalu fyri Suðuroy.

Fyrst játtaðu kommunurnar í Suðuroy og landskassin hvør sínar 250.000 krónur til at kanna eftir, hvørjar vinnugreinar, tað var mest hóskandi at ment í Suðuroy og til at gera avtaluna fyri.

Av tí, at talan skuldi vera um eina beinleiðis avtalu, vildu serfrøðingarnir báðir frammanundan hava váttan fyri, at ein grunnur varð settur á stovn, sum kundi vera við til at fíggja tey vinnuligu tiltøk, sum skulu setast í verk.

Tað var mett at vera hóskandi at seta 50 milliónir av til at seta avtaluna í verk. Og tað lá í kortunum, at kommunurnar og landið skuldi betala hvør sínar 25 milliónir

Men tað hildu kommunurnar í Suðuroy ikki, at tær høvdu ráð til.

Á fundi í oktober, varð tosað um at broyta býtið, so at kommunurnar í Suðuroy skuldu leggja 10 milliónir á borðið tey næstu fimm árini og landið 40 milliónir.

Fyri at staðfesta hetta, skrivaðu allir borgarstjórarnir í Suðuroy undir eitt viljunarskriv, har teir váttaðu at kommunurnar vóru sinnaðar at betala sín part.

Viljunarskrivið varð handað landsstýrismanninum í innlendismálum og avtalan varð, at hann skuldi leggja málið fyri landsstýrið og samgonguna, søgdu Jógvan Mørkøre og Magni Laksafoss í Sosialinum í gjár.

Men so kom stígur í málið, tí síðani hevur landsstýrismaðurin ført fram, at tað er neyðugt, at øll bý- og bygdaráðini í Suðuroy samtykkja at betala sín part av teimum 10 milliónunum fyri at staðfesta tað, sum borgarstjórarnir vilja.

Og tað hava øll bý- og bygdaráðini gjørt, uttan Tvøroyrar Býráð. Og har liggur málið í løtuni.